# ar 25 ára føðingardag

## Stórt tiltak á Halsi

Tann 21. november er so útgávudagurin, og tá er eisini útgávu og føðingardagskonsert á Hálsi. Talan er tó um meira enn bert eina vanliga konsert og dans, tí gjørt verður burturúr.

Á fleiri av útgávunum hjá Frændum eru gestasangarar við, og so verður eisini á Hálsi tann 21. november. Frændur hava eisini altíð nýtt fremstu tónleikarar í landinum, bæði á palli og á útgávum, og hetta verður neyvan øðrvísi á Hálsi.

Høllin verður stásað, og fólk fáa bæði vátt og turt til vælkomst. Tiltakið byrjar klokkan 22 og har verður nýggja tilfarið at hoyra, umframt góðu og gomlu, kendu løgini. 18 ára aldursmark er til tiltakið, sum kostar 250 krónur, og atgongumerkir fáast á netinum á bilett.fo og í Miðlahúsinum.

